# - Eg skal ikki lig

**Fyrrapartin fekk Bjarni Djurholm umsóknina frá felagnum, ið ætlar at gera ein undirsjóvartunnil millum Skálafjørðin og Havnina. - Eingin ivi er um, at henda verkætlanin fer at gagna øllum samfelagnum, sigur hann. Uppskotið um heimild verður lagt fyri tingið í næsta mánaði.**

TUNNIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skálafjørður:** Gongst sum ætlað verður koyrandi av Skálafjørðinum til Havnar á sumri 2012.

Í longri tíð hevur verið arbeitt við at fyrireika ætlanina, og nú er altso komið hartil at biðið verður um tað formliga loyvið at fara undir hesa.

Á framløgu í Norðurlandahúsinum varð greitt frá, hvussu ein hugsar sær at hesin triði undirsjóvartunnilin kemur at liggja – og ikki minst, hvat hann fer at kosta.

Nógvar ætlanir hava verið frammi um hetta og fleiri linjuføringar hava verið í uppskoti. Men sum støðan er nú, hevur ein valt eina miðloysn.

Henda ber í stuttum í sær, at tveir tunnilsmunnar verða gjørdir á Skálafjørðinum, ein á Selvindi á Strondum og ein við Løkin í Runavík.

Hesir tunlarnir møtast so á Saltnesgrynnuni, hagani leiðin verður løgd víðari til eitt øki beint uttanfyri Sund á Streymoynni.

Íalt verður høvuðstunnilin 7,1 km. langur og íalt er talan um 11,1 km. av samlaðari tunnilslongd.

Kostnaðurin er mettur til eina slaka 1 milliard og eru tað Kaupthing og Føroya Lívstrygging, saman við øðrum sum fíggja ætlanina.

**Frætta skjótt aftur**

Fyrrapartin í dag handaði nevndin í partafelagnum Skálafjarðartunnilin umsókn til vinnumálaráðið um at fáa heimild at fara undir hesa stóru ætlanina.

Tað var Ingi Højgaard, formaður í nevndini sum á samkomuni handaði Bjarna Djurholm ein kassa við umsóknini.

Hetta er ein ætlan sum hóvar vinnumálaráðharranum væl, og hevur hann eisini verið væl kunnaður um ætlanina, síðani hon varð løgd fram fyri trimum árum síðani.

- Gera vit eina kost-nyttu meting av ætlanina, so er hon avgjørt gagnlig fyri samfelagið.

- Nú fari eg at biðja løgtingið um heimild at seta hesa prosessina í gongd, segði Bjarni Djurholm á samkomuni í morgun.

Sjálvur roknar hann við, at eitt uppskot um heimild at fremja hesa ætlanina kann verða lagt fyri løgtingið áðrenn 1. mars í ár.

- Eg ætli mær so ikki at liggja á boðunum. Tit frætta skjótt aftur frá mær, segði hann fundarfólkunum.

**Tøknilig avbjóðing**

Dávur Reinert Hansen, tekniskur stjóri hjá partafelagnum greiddi frá, at tá hugskotið varð lagt fram fyri

> *Gera vit eina kost-nyttu meting av ætlanina, so er hon avgjørt gagnlig fyri samfelagið*



*Bjarni Djurholm við stóru og heldur óvanligu umsóknini um heimild at gera ein undirsjóvartunnil millum Skálafjørðin og Havnina. Ingi Højgaard, formaður í nevndini kann vænta sær eitt skjótt svar aftur*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Tunnilsmunnin strandamegin verður í Selvindi*




*Miðlinjan er vald í sambandi við tunnilsgerðina – av Sundi inn á Saltnesgrynnuna, har tveir tunlar verða gjørdir til Runavíkar og Strendur*

**FAKTA**

Longd á høvuðstunli: **7,1 km**
Longd á vestara greintunli (til Strendur): **2,1 km**
Longd á eystara greintunli (til Runavíkar): **1,8 km**
Samlað longd á øllum vegastrekkjum í Skálafjarðartunlinum: **11,1175 km**
Støðd á rundkoyring (tvær breytir): **59 metrar**
Tríggjar koyribreytir (13 metrar) verða gjøgnum tunnilin
Samlaði kostnaðurin av allari verkætlanini er mettur til 900 til 1000 mió krónur.